Øssur og Hjalti live á fløgu

Øssur Johannesen á bassgittar og Hjalti Joensen á gittar hava verið vinir og spælt saman í meira enn 20 ár. Øssur Johannesen hevur áður givið 4 fløgur út við solobassi, yrkingaupplestri og øðrum ljóðførum. Hjalti Joensen er kendur sum dugnaligur gittarleikari frá so stórum nøvnum í Føroyum sum eitt nú Moirae, Terji Rasmussen, Húskallar, Devon. Upptøkurnar vórðu gjørdar á konsertum tann 24. november 2006 umborð á høganesi í Runavík, og tann 25 november sama ár í Atlantis í Klaksvík. Øssur og Hjalti hava komponerað tónaverkið. Umframt hettar eru ymisk temað eftir Beethoven, ein kirkjusálmur, og okkurt eftir Jørgen Dahl av veðraplátuni hjá Straight Ahead úr Klaksvík.

Portalur til útisetar

Týsdagin 1. juli 2008 fingu mongu føroysku útisetarnir teirra egna portal. Heitið á nýggju heimasíðuni er www.utisetanytt.dk. Tað er navnframi sangarin og grafikarin, Símun úr Konoy, ið er stigatakarin til síðuna. Símun sigur, at tíðin eftir øllum at døma sum frálíður er farin frá prentaða miðlinum. - Útreiðslurnar av serstakliga postútberingini eru seinastu árini vorðnar alt ov høgar. Tí er bert ein gongd leið, og tað er at leita sær út á alnetið, um tú ert útgevari av einum miðli av einhvørjum slag. Í dag, har nærum hvørt húski hevur í minsta lagið eina teldu standandi í stovuni, á skrivstovuni ella sovikamarinum, er í veruleikanum ikki neyðugt við prentaðu bløðunum og avísunum longur, metir hann.

Sølva Ford starvast sum heimahjálpari á Sambýlinum í Kollafirði. - Tey eldru verða gloymd, og vit hava hvørki fólk ella orku at nøgda teimum tørvum, brúkararnir hjá okkum hava

Sølva Ford:

Eldraøk

Eldraøkið er missrøkt, sigur Sølva Ford, ið arbeiðir sum heimahjálp á sambýlinum í Kollafirði. Dagvaktin á sambýlinum er skorin niður í eina helvt, meðan Nærverkið sigur, at tað er ein trupulleiki at seta fólk í starvi. Vit hava ikki tíð at røkja allar uppgávurnar til fullnar í so ringum umstøðum, og brúkararnir verða gloymdir, sigur Sølva Ford

ELDRARØKT

Bjørk K. Olsen
bjork@sosialurin.fo

Dagvaktin á eldrasambýlinum í Kollafirði er skorin niður í eina helvt. Ein dagvakt er nú einsamøll um einar níggju tungar brúkarar um vikuna umframt at skula aftur á sambýlið at arbeiða aftan á átta tímars heimarøkt. Uppgávan hjá heimarøktini í Kollafirði er at gera mat, keypa inn, rudda, vaska upp, gera reint, vaska klæðir og strúka, og tey hava nóg illa tíð til hetta, sigur Sølva Ford, ið arbeiðir sum heimsarøkt á sambýlinum í Kollafiriði.

Kala Durhuus fær heimahjálp frá sambýlinum. Hon hevur ein skaða í beininum, men sambýlið hevur ikki tíð og orku at geva henni meir enn einar tveir tímars reingerð um mánaðan. Sølva Ford fýlist á, at tað sendur so illa til.

Mary í Garði, stjóri á heimrøktini og serforsorgini í Nærverkinum, sigur, at heimatænastan hevur hugt eftir øllum heimatænastum, og heimahjálpin í Kollafirði svarar til heimahjálpina aðrastaðni í landinum.

- Vit hava ikki fingið nakra negativa melding aðrastaðni frá, sigur Mary í Garði.

Kann tað vera rætt, at ein eldri kona í Kollafirði skal sita einsamøll við ringum beinum og ikki fáa meir enn reingerð tvær ferðir um mánaðan?

- Heimahjálpin í Kollafirði hoyrir til Streymoynna, har stórsti trupulleikurin liggur. Vit mangla fólk, og tað er ein trupulleiki at seta fólk í starvi, sigur stjórin, men skerir alíkavæl dagvakturnar á sambýlinum í Kollafirði niður í eina helvt.

Betri umstøður á Sandoynni

Hóast Mary í Garði sigur, at umstøðurnar í Kollafirði svara til umstøðurnar aðrastaðni, ljóðar hetta ikki so, tá Sosialurin ringir suður á eldrasambýlið í Skopun.

- Vit hava fá fólk at fara út til á Sandoynni. Tað er tí bara ein, ið fer út til heimahjálp. Viðhvørt hava vit ússaligar brúkarar, og tá eru vit útkoyrdar, men sum nú er, kann eg ikki klaga um umstøðurnar. Eg hevði tó ongantíð klárað at arbeitt í átta tímar út í eitt hvønn dag, sigur ein kvinna, ið arbeiðir sum heilsuhjálpari á Sandoynni.

- Eg arbeiði einar fimm tímar um dagin, og vit hava minimala reingerðin, og tá nýta vit ta tíðina, vit hava brúk fyri, at vera hjá brúkaranum. Eg havi millum tríggj-